UTTAN ÚR HEIMI

## Iran slakaði

Eftir trýsti úr Bretlandi, Fraklandi og Týsklandi hava myndugleikarnir í Iran játað at gevast við at ríka uran.

Iran skrivaði í síðstu viku undir ein sátmála við tey trý londini, og sunnukvøldið segði iranski samráðingarleiðarin, Hassan Rohani, at landið er gingið við til at steðga øllum sínum kjarnorkuætlanum. ST hevur hótt Iran við handilstiltøkum, men sambært Rohani lýkur sáttmálin við tey evropeisku londini allar tær treytir, sum ST hevur sett. Sunnukvøldið kunngjørdi altjóða kjarnorkustovnurin IAEA, at hann hevði fingið at vita frá iransku stjórnini, at hon hevur steðgað øllum sínum kjarnorkuætlanum.

USA hevur leingi lagt Iran undir at royna at útvega sær kjarnorkuvápn. Hesum hevur stjórnin í Teheran víst aftur og hevur víst á, at landinum tørvar kjarnorkuna fyri at nøkta tann skjótt veksandi orkutørvin.

## Tutankamon skal kannast

Egyptisku myndugleikarnir hava gjørt av at kanna, hví tann søguligi kongurin Tutankamon doyði bara seytjan ára gamal.

Tutankamon var kongur í Egyptalandi fyri umleið 3.300 árum síðani. Hann var bara átta ára gamal, tá hann tók við, men níggju ár seinni doyði hann. Í 1922 var gravkamar hansara funnið uttan fyri býin Luxor har suðuri í Egyptalandi, og síðani hava fornfrøðingar og søgufrøðingar gitt, hví hann doyði so ungur.

Í 1968 vórðu røntgenmyndir tiknar av Tutankamon, og tær bendu á, at hann doyði í bardaga ella av einum slagi í høvdið. Men sambært egyptisku fornfrøðingunum vóru tær kanningarnar ikki nóg álítandi. Harafturat eru kanningartólini ment nógv hesi árini, og tí er ætlanin at kanna líkið eina ferð afturat.

## Færri fátækir danir

Fyrr var fátækradømi rættiliga vanligt ímillum eldri fólk í Danmark, men soleiðis er ikki longur.

Orsøkirnar til broytingina eru fleiri. Nógvir av teimum núverandi pensjonistunum í Danmark hava verið virknir á arbeiðsmarknaðinum og hava tí eina pensjónsuppsparing at dúva uppá. Fyrr vóru tað serliga kvinnurnar, sum vóru illa fyri fíggjarliga, tá tær gjørdust eldri, men soleiðis er ikki longur, tí eisini tær hava nú uppsparing frá arbeiðstíðini.

Kortini vísir tað seg, at tað eru framvegis fólk í Danmark, sum hava ilt við at fáa endarnar at røkka saman. Berlingske Tidende skrivar, at hesin bólkurin umfatar serliga einligar mammur við fleiri børnum og fólk, sum liva av kontanthjálp frá tí almenna. Ein uggi hjá dønum er, at har er fátækradømið minkað, samstundis sum tað er vaksið í fleiri øðrum londum.

## Ongar hítreklamur

Hóast eyðkvæmistilburðirnir eru øktir nógv í Singapore tey seinastu árini, vilja myndugleikarnir ikki eggja fólki til at brúka hít.

Balaji Sadasvian, heilsumálaráðharri, sigur við sjónvarpið Channel NewsAsia, at myndugleikarnir ásanna gagnið av at nýta hít, men at teir vilja ikki eggja fólki til at brúka hít kortini, tí ein tílík áheitan hevði fallið einum parti av fólkinum fyri bróstið, sigur hann. Tí verða ongar reklamur fyri hítum at síggja í Singapore, sigur ráðharrin.

Umleið tríggjar milliónir fólk búgva í Singapore. ST sigur, at umleið 4.000 fólk har eru HIV-smittað, men at talið kann koma upp í 15.000 innan 2010, verða eingi munagóð fyribyrgingartiltøk sett í verk.

# Túsundtals fólk í Falluja fáa hvørki vátt ella turt

**Hjálparfelagsskapir sleppa ikki inn í Falluja við neyðhjálp, tí viðurskiftini eru ikki nóg trygg enn**

IRAK
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Sunudagin søgdu amerikanararnir, at teir høvdu tikið irakska býin Falluja, men í gjár vóru aftur bardagar summastaðni í býnum.

Teir seinastu dagarnar hava fleiri tíðindastovur borið tíðindi um, at nógv fólk í Falluja hava hvørki fingið vátt ella turt í fleiri dagar. Nógv fólk hava eisini fingið skaða av bumbum og granatum, og fleiri eru deyð. Ein tíðindamaður hjá Reuter greiddi í gjár frá, at nógv lík liggja í gøtunum í býnum.

Í gjár komu sjey lastbilar hjá muslimska hjálparfelagsskapinum Reyða Hálvmána til Falluja við neyðhjálp, men amerikonsku hermenninir steðgaðu teimum og góvu teimum boð um at bíða uttan fyri býin.

Amerikanska herleiðslan sigur, at minst 1.200 uppreistrarmenn eru deyðir í bardøgunum um Falluja. 38 amerikanskir hermenn eu deyðir, og næstan 300 eru særdir.



*Hesin tvey ára gamli drongurin misti annað beinið í einum granatálopi í Falluuja. Men hann var heppin at sleppa á sjúkrahús*

*Mynd: Reuters*

# Herurin í Kili viðgongur píning og morð

**Fyri fyrstu ferð í meiri enn 30 ár hevur hervaldið í Kili viðgingið illgerðirnar ímóti politisku andstøðingunum tey árini, hernaðarstýrið sat við valdið**

KILI
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Líka síðani tað blóðuga hernaðarkvettið tann 11. september í 1973 hevur hervaldið í Kili avsannað, at politiskir andstøðingar vórðu píndir og myrdir tey seytjan árini, herurin hevði valdið í landinum. Men nú ein almenn frágreiðing hevur avdúkað framferðina hjá hernaðarstýrinum, viðgongur herleiðslan illgerðirnar.

Í frágreiðingini stendur, at minst 35.000 fólk vórðu sett í fongsul og illa pínd. Meiri enn 3.000 vórðu myrd. Summi teirra vórðu slept úr tyrlum niður yvir Kyrrahavið ella jøklarnar í Andesfjøllunum. Nøkur teirra vórðu tveitt livandi úr tyrlunum.



*Augusto Pinochet. Hernaðarstýri hansara myrdi umleið 3.000 andstøðingar, og meiei enn 35.000 vórðu pínd*

Núverandi verjuovastin í Kili, generalurin Juan Emilio Cheyre, bað um vikuskiftið kilska fólkið um umbering.

– Øll hesi árini hevur hervaldið avsannað illgerðirnar. Vit hava umborið okkum við, at tað kalda kríggið herjaði tá, og at tað var neyðugt at berjast ímóti teimum vinstravendu. Men hetta er eingin umbering fyri at pína og myrða fólk. Tí biði eg øll tey, sum gjørdust offur fyri hesari framferðini, um umbering, segði generalurin við blaðið La Tercera.

Ricardo Lagos, forseti, er sera fegin um, at hervaldið hevur viðgingið síni mistøk.

– Hetta er eitt søguligt skjal, tí hetta er fyrstu ferð, at hervaldið viðgongur, at mannarættindini vórðu brotin, meðan hernaðarstýrið hjá Pinochet ráddi. Hetta er ein fagnaðardagur fyri tað kilska demokratiið, sigur tann sosialistiski forsetin.

Sambært frágreiðingini um framferðina hjá hernaðarstýrinum vóru tað serliga herurin og herflotin, sum gjørdu seg inn á andstøðingarnar, og hildið verður, at umleið 70.000 hermenn og onnur tóku lut í tiltøkunum. Teir flestu andstøðingarnir vóru studentar, fakfelagsleiðarar, vinstrasinnaðir politikarar og mentafólk.

Gamli hernaðarleiðarin, Augusto Pinochet, er higartil sloppin undan rættarsókn, tí læknar hansara halda ikki, at hann er nóg byrgur til at koma fyri rættin. Ákæruvaldið hevur kravt hann kannaðan av nýggjum, og nú verður bíðað eftir, hvat tær kanningarnar hava víst, skrivar Reuter úr Santiago.



# Kalsoyingar stríðast fyri at fáa kvøldtúr

**Borgarstjórarnir í Klaksvík og í Mikladali heita á landsstýrið um at brúka nýggju ferjuleguna í Kalsoynni meira, so at verulig nytta fæst burtur úr milliónaíløguni**

FERÐASAMBAND
*Eyðun Klakstein*



*Kalsoyingar gleða seg til, at nýggja ferjulegan á Syðradali verður tikin í nýtslu, men teir vilja hava túrar fyrri og seinni á degnum*

Borgarstjórarnir í Klaksvík og Mikladals kommunu heita í einum opnum brævi til Jógvan við Keldu, landsstýrismann, á myndugleikarnar um at betra um ferðasambandið millum Kalsoynna og Klaksvík.

Teir halda, at tað nyttar lítið at gera eina nýggja ferjulegu fyri eina stóra milliónа upphædd, men so ikki brúka hesa ferjuleguna meira, enn ætlanin er.

– Serstakliga er tað sambandið til og frá Kalsoynni um kvøldið, sum als ikki er til staðar, skriva Steinbjørn O. Jacobsen og Markus í Norðnástovu í brævinum til landsstýrismannin í innlendismálum, sum millum annað umsitir samferðslu- og útoyggjamál.

### Mangla samband tíðliga og seint

Strandferðslan hevur gjørt eitt uppskot um nýggja ferðaætlan, tá ið nýggja ferjulegan á Syðradali verður tikin í nýtslu um ársskiftið, og sambært hesum uppskoti, sum er sent til hoyringar, verður eingin túrur sigldur eftir náttúrðatíð.

– Hetta ger, at fólkið á Kalsoynni – hóast spildurnýggja ferjulegu, sum hevur kostað landskassanum eina milliónаupphædd – framvegis verða avskorin frá at luttaka í frítíðar-virksemi, ítrótt og sosialum tiltøkum ella kvøldskúlaundirvísin í Klaksvík ella aðrastaðni á meginlandinum, siga borgarstjórarnir í brævinum til landsstýrið.

Teir finnast eisini at, at siglingin ikki byrjar nóg tíðliga á morgni, so at eitt nú miðnámsskúlanæmingar á Kambsdali kunnu búgva í Kalsoynni.

### Kostar eina millión um árið

Borgarstjórarnir í Klaksvík og Mikladali hava havt fund við umboð fyri Strandferðsluna fyri at fáa meira sigling millum Klaksvík og Kalsoynna, men nú uppskotið um nýggja ferðaætlan er gjørd, eru ongir kvøldtúrar.

– Tí mugu vit tíverri staðfesta, at nyttan av hesi milliónaíløgu verður skerd munandi, tí landið ikki setir tann neyðuga peningin av á rakstrarsíðuni, so sigling um kvøldið eisini verður gjørlig, siga teir báðir borgarstjórarnir.

Sambært teimum fer ein víðkan av ferðaætlanini at kosta Strandferðsluni eina millión krónur um árið, og verðandi játtan til Strandferðsluna røkkur ikki til.

### Biða um hjálp

Steinbjørn O. Jacobsen og Markus í Norðnástovu heita í brævinum á Jógvan við Keldu, landsstýrismann, um at taka neyðugu stigini til at útvega Kalsoyarleiðini pengar, so verulig nytta fæst burtur úr nýggju ferjuleguni.

– Við bilferjusambandi hevur Kalsoyggin fingið ein søguligan møguleika at menna seg sum ein landslutur. Nú restar bert ein avmarkað rakstrarjáttan, og hana vóna Klaksvíkar og Mikaldals kommunur, at landsstýrismaðurin fer at gera sítt ítarsta til at at veita teimum, siga borgarstjórarnir í brævinum.

**Lesið meira á síðu 5**

## Lágt arbeiðsloysi

Arbeiðsloysið í Føroyum er ikki serliga stórt í mun til hini norðanlondini. Í veruleikanum hava vit í Føroyum næstlægsta arbeiðsloysi í norðurlondum. Í september var arbeiðsloysið í Føroyum 3,5 %, og bert í Íslandi var tað lægri, nevnliga 2,6 %.

Hægsta arbeiðsloysið í Norðan-londum er í Finlandi, har tað er 8,4%. Í Danmark er arbeiðsloysið í løtuni um 4,5%.

**-tn**

